# Darwin á føroyskum






Sjálvævisøga Charles Darwin er nú komin út í føroyskari týðing. Og tað er eingin mætari enn tann hegnigi og arbeiðssami Guttormur A. G. Djurhuus, sum hevur týtt. Bókin um Darwin er sostatt tann fjóðra bókin, sum Guttormur hevur týtt til føroyskt í ár.

Bókin kemur út nú tað eru liðin 200 ár síðani, at Charles Dawin (1809 - 1882) varð borin í heim, og 150 ár síðani at kollveltandi verkið Origin of Species kom út. Hetta heldur týðarin er eitt hóskandi høvi til at fáa givið út hansara sjálvævigsøgu á føroyskum.

Hon verður mett at vera ein livandi klassikari og ein av bestu sjálvsævigsøgum, ið skrivað er. Her sigur hann millum annað frá sínum barnaárum, læknalestrinunm í Edinburgh, prestalestrinum í Cambridge og kanningarferðini við HMS Beagle. Eisini greiðir hann frá síni átrúðanarligu menning. Hvussu hann frá at vera djúpt trúgvandi so líðandi gjørdist vantrúgvandi.

Í hesi týðing eru eisini teir partar tiknir við, sum av siðsømuligum orsøkum ikki vórðu tiknir við í útgávuna, ið kom út nøkur ár aftaná at Darwin var deyður. Bókin, sum er 108 síður, er umbrotin og prentað á Prenta og útgevari er Rísandi sól.

# Fleiri umsóknir til øll prestastørvini

**Upp í seks umsóknir eru til hvørt av teimum fimm prestastørvunum, sum setast skulu fyrst í nýggja árinum**

**FÓLKAKIRKJAN**
*Randi Jacobsen*
*randi@sosialurin.fo*


*Vesturkirkjan skal hava ein prest aftrat, og seks umsóknir eru til tað starvið*

Onkur nýggj andlit í Føroyum eru millum umsøkjarnar til tey fimm leysu prestastørvini í Føroyum. Meira enn eitt, verður upplýst av bispaskrivstovuni.

Umsóknarfreistin til størvini var úti hósdagin, og í dag fór brævfrá bispi til kirkjuráðini um, hvørjir umsøkjararnir eru til størvini.

Bispur skal um nýggjársleitið út at hava fund við kirkjuráðini í teimum sóknum, sum skulu hava nýggjan prest, og størvini verða væntandi sett tíðliga í nýggja árinum.

Fleiri umsøkjarar eru til hvørt starv:

Fýra hava søkt starvið í Norðoya vestara prestagjaldi. Fýra hava søkt starvið í Sjóar prestagjaldi, Strendur. Fimm hava søkt starvið í Norðstreymoyar prestagjaldi, Kvívík.

Fimm hava søkt til Suðurstreymoyar eystara prestagjald. Seks hava søkt nýggja starvið í Suðurstreymoyar vestara prestagjaldi.

Sum skilst hava nakrir umsøkjarar søkt fleiri av størvunum.

Dómpróstastarvið er eisini lýst, og til tað starvið eru tríggjar umsóknir.

Tað er ógvuliga óvanligt, at so nógv størv eru leys í senn at søkja.

Roknast kann við, at næstu árini verða fleiri størv leys, tí nakrir av verandi prestum eru komnir upp í árini, og tí skuldi møguleikin verið góður hjá teimum, sum lesa til prest, at fáa starv í Føroyum.

vindeygu hurðar klædningur ... www.import.fo

Nøgd, snið og stødd eftir tygara ynski, einki standard



Vindeygu úr kjarnutræ
– træ fyri lívið!

Vit hava nokk øll undrast yvir t.d. teir gomlu bygningarnar úti í Tinganesi, og tær gomlu træ kirkjurnar. Nógvir av hesum bygningunum eru fleiri hundrað ára gamlir. Viðurin stendur ár eftir ár, uttan at tíðin setir síni spor. Einki rot, tí tað høga kjarnuinnihaldið í viðinum forðar fyri, at tílíkt kann grógva í viðinum. Her er talan um kjarnutræ!

Framleiðarar av vindeygum við 90-100% kjarnutræi eru skrásettir undir »2 øko-ordningen« hjá Dansk Vindue Certificering (DVC). Strangasta góðkenning í vindeygavinnuni.

»Øko« er stytting fyri økologisk, tí hesin viður nýtist ikki aðra viðgerð sum t.d. impregnering. Viðurin er 100% gjøgnum viðgjørdur frá náttúruni.

Sosialurin 341800

**Træ vindeyguni og hurðarnar hjá Sp/f İmport.fo hava øll:**
• Minst 95 % kjarnutræ innan og 100 % uttan.• Framleiðara ið er skrásettur undir 2 øko-ordningen hjá Dansk Vindue Certificering (DVC). • Spegilsskorið og límað kjarnutræ. • İSO 9001 góðkenda framleiðslu.
• Bakfestar glaslistar og síðani fugað við hond, innan og uttan. T.v.s. ongir sjónligir seymir, ið kunnu rusta.




İmport v/Toni Dam
Postboks 3070
Skótarók 3
FO-110 Tórshavn

Tel. +298 321 521
Fax +298 321 421
import@import.fo

Opið er:
mán - frí kl. 08.00 - 16.30
Annars eftir avtalu

import.fo